TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Pedagogar

Býlingshúsið undir Fjalli søkir eftir tveimum pedagogum.

Størvini
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna í barnagarðsstovu, við 20 børnum, og eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna í vøggustovu, við 12 børnum.

Stovnslýsing
Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn, tað eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum og ein vøggustova við 12 børnum.Umstøðurnar eru góðar, og økið uttanum stovnin er barnavinarligt.

Vit ynskja
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

Setunarviðurskifti
Størvini verða sett tann 1. februar 2002 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Katrin Joensen, leiðara, tlf. 314665, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum skulu vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjallsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002.

SNARSKIVAN

Plejefamilie

Der søges efter en familie på Færøerne, gerne i Torshavn, som vil påtage sig at være plejefamilie for en lille pige på knapt 3 år.
Barnets problemstillinger er bl.a., at hun har svært ved at knytte sig til andre mennesker, og hendes evne til at kunne fastholdes i en aktivitet er meget afhængig af den voksne, som hun er sammen med og tryg ved.

Pigens far stammer fra Færøerne, og det er hans ønske, at barnet vokser op der i tæt kontakt med sin biologiske familie. Faderen vil være bosat på Færøerne, så hans samvær med barnet vil kunne foregå regelmæssigt i plejefamiliens hjem eller hos faderens familie.
Dette indebærer, at plejefamilien skal være indstillet på samarbejde med far og fars familie under barnets anbringelse.
Plejefamilien må endvidere være indstillet på at have omsorgen for barnet resten af hendes barndom. Det er ønskværdigt, at plejeforældrene har en pædagogisk baggrund, men det er et krav, at de skal kunne modtage og bruge supervision, da barnets problemstillinger kræver speciel viden i, hvordan man bedst støtter hende i hendes fortsatte udvikling.

Plejefamilien skal være indstillet på at leve et meget struktureret liv med daglige rutiner, som indebærer en for barnet meget høj grad af forudsigelighed og gentagelser, da hun er fuldstændig afhængig af disse ting for at kunne fungere.

Inden plejeforholdets iværksættelse skal plejeforældrene grundigt sættes ind i barnets problemstillinger og hvorledes, man bedst hjælper barnet med at håndtere disse. Dette vil indebære, at plejefamilien i en periode på mindst en til to måneder flytter til København i nærheden af barnets nuværende bopæl.
Denne periode skal bruges til, udover at lære barnet godt at kende, at få et indgående kendskab til og redskaber overfor barnets psykiske og følelsesmæssige problemstillinger.

Der må ikke være mindre børn i familien, da plejebarnet vil kræve mange ressourcer fra de voksnes side.

I udvælgelsen af den rette familie, vil der deltage repræsentanter fra Familie- og Arbejdsmarkedsforvaltningen, Lokalcentret Nørrebro og fra Skodsborg Observations- & Behandlingshjem.
Lokalcentret Nørrebro forventer at aflønning vil ske iflg. de på Færøerne gældende regler om aflønning af plejefamilier.

Når plejeforholdet er etableret, vil tilsyn og supervision varetages af Torshavns kommune.

Eventuelle spørgsmål kan rettes til, enten Børne- og Ungdomskonsulent Anders Holm Jensen på tlf. 3317 6431, eller Socialrådgiver Charlotte Petersen på tlf. 3317 6456, mellem 09.00 og 13.00 på alle hverdage.

Ansøgningsfrist: Senest 15. januar 2002.

Ansøgningen sendes til:

Lokalcentret Nørrebro,
Børne- og familieteamet,
Baldersgade 3B,
2200 København N.
att.: Anders Holm Jensen

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3288
Navn: Sp/f Tváttur
Adressa: 480 Skáli
Kommuna: Skála Kommuna
Stovningardato: 19.11.2001
Viðtøkudato: 19.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Hjalmar Kollslíð, 480 Skáli.
Stjórn: Jóna Kollslíð, 480 Skáli.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - Fyrsta roknskaparár: 19.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er vask, umvæling og søla av arbeiðsklæðum og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3287
Navn: Sp/f Mercatoria

Adressa: Millum Gilja 49, 188 Hoyvík

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 19.12.2001
Viðtøkudato: 19.12.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Kitty May Ellefsen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Stjórn: Kitty May Ellefsen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra
Grannskoðari: KPMG statsaut. revisorar Sp/f, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 19.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at veita ráðgeving, selja og keypa virðisbrøv og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. desember 2001

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3286
Navn: Sp/f Joensen & Hansen
Adressa: 350 Vestmanna
Kommuna: Vestmanna Kommuna
Stovningardato: 19.12.2001
Viðtøkudato: 19.12.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Regin Joensen, Argjaboðagøta 32a, 160 Argir og Óli Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Nevnd: Regin Joensen, Argjaboðagøta 32a, 160 Argir (formaður) og Óli Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík..
Stjórn: Óli Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella av tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: KPMG statsaut. revisorar Sp/f, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 19.12.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at keypa og selja partabrøv og annað í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. desember 2001

Kristin Balle

ítróttur

Nr. 248 • leygardagur • 22. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Tórsvøllur 2. byggistig ?

Fríggjadagin, 14. desember 2001 hevði Sjónvarp Føroya tíðindabrot, har Poul Michelsen, formaður í Grunninum Tórsvølli, við orðum og myndum greiddi frá, ætlaða 2. byggistigi av Tórsvølli, tí hesar reglur.

Ísak Mikladal
19. december 2001

Á middegi sama dag, hevði fyrrverandi stjórin á Búskaparráðnum og nú ein av stjórunum í Føroya Sparikassa, Bjarni Olsen, rópt varskó, tí hann metti, at ferðin á búskapinum er ov stór, og heitti tískil á politikarnar um at tátta í. Men helst hava ikki øll lurta eftir hesum skilamanni, tí sama kvøldið kom aftur ein verkætlan í 100 tals millióna klassanum á borðið.

Eg taki stórt sæð undir við Bjarna Olsen, men haldi, at tað hevði ongan skaða gjørt, um vinnan og onnur, vísa størri fyrilit fyri samlaða búskapinum — tí annars kann sama hóttfall vera væntandi sum fyri 10 árum síðani.

Føroyar hava havt eitt ómetaligt viðrak síðan 1997/98, í umleið 5 ár, men eingin kann í dag við vissu siga at viðrakið heldur fram á sama hátt sum nú, men sjálvt um tað hendir, er neyðugt við skinsamari stýring og konsolidering.

Sambært framløguni í SVF, nevndi Poul Michelsen, at kostnaðurin av hesið verkætlan verður umleið 100 til 150 mill. kr. Eg kann tíverri ikki vera samdur við honum í hesum, við leysliga at meta um kvadratmetra talið, kemst eftir, at byggjast skulu umleið 25000 kvadratmetrar. Og at talan er um: hotel, skrivstovur, barnagarð, røktarheim, ellisheim, frítíðarvirksemi v.m. Út frá hesum má metast, at kostnaðurin fyri hvønn kvadratmetur ikki verður lægri enn kr. 13.000,- tá er alt írokna, og gevur hetta eina samlaða íløgu uppá millum 325 og 400 mill. kr. Roknast skal við, at tað er heldur dýrari at byggja undir og við situplássini á Tórsvøllí enn á einum planeraum øki, har lætt atkomuligt er.

Hetta er eitt sindur skelkandi - lærdu vit einki av 80'unum, vit kunnu vera samd um, at Poul Michelsen er ikki hvør sum helst, hann var jú ein av undangongumonnunum í 80'unum. Í eini sjónvarpssending herfyri, var Sjúrður Skaale enn tá so illavorðin at vísa á verkætlanina inni á Sundi sum eitt ræðandi dømi um vantandi ábyrgdarkenslu, — við rentum man ætlanin inni á Sundi í dag, fara at tátta upp ímóti 200 mill. kr. — Men har er stórt sæð einki virksemi og mestsum klárt at byggja, — men kanska kann alt annað byggjast har, enn tað sum havnalagi varð ætlað til.

Jú, tað er møguligt, sum Poul Michelsen tók til, at um stíla verður høgt og falli er stórt, endar man hægri enn man var áðrenn byrjanina. Men tað velst eisini um so mangt annað - hvør situr eftir við skuld, - hvør fór av í svinginum, og hvør fór við í fallinum og møguliga ongantíð reistist aftur.

Í tíðindabrotinum var eisini lagt upp til, at Gundadalur komandi 20 árini skal vera eitt byggipláss, tí verkætlanin skal gjøgnumførast so vid og vid, yvir eitt longri tíðarskeið.

Stórur vandi er fyri, at nevnda verkætlan, verður alt ov tyngjandi fyri økið í Gundadali, neyðugt verður við t.d. minst 1 parkeringsplássi fyri hvørjar 50 kvadratmetrar bygt verður, t.v.s. minst 500 parkeringplássum, umframt hetta er neyðugt við ávísum fríøki v.m., og hvussu væl eru skrivstovur, hotel, røktarheim og ellisheim egna saman við venjing, dystum og barnagørðum v.m. Aðrastaðni har stórir leikvallir eru, er friður fyri ítrótti næstan altíð, uttan sjálvandi tá dystir eru og tí sum har tilhoyrir, men so er ikki í Gundadali, og soleiðis eigur tað heldur ikki at vera í Gundadali, tí venjing byrjar so skjótt skúlin er liðugur og ofta áðrenn tað, og dystir eru hvørt vikuskifti frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi.

Lagt var eisini til merkis, at ein hædd var tekna oman á verandi bygning við Tórsvøll, tað merkir at bygningurin og verkætlanin annars verður gott 5 hæddir, tað er møguligt at Poul Michelsen hevur gloymt, at Fótbóltssambandið hevur goldið henda bygning, og eigur at metast sum ogn hjá Fótbóltssambandinum — fótbóltsfeløgunum, men er av tekniskum orsøkum ikki yvirtikin enn av FSF, eg rokni við, at fótbóltsfeløgini ganga út frá, at FSF hevur tryggja sær ognarrætt til bygningin — FSF er ogn hjá fótbóltsfeløgunum og skal ósjálvsøki tæna feløgunum. Tað tykist sera ósmæði, uttan himpr at stilla seg fram við myndum og tekningum, har ætlanin er at byggja oman annan manns ogn.

Sum nú er, hevur ætlaða verkætalan, hvørki verið til hoyring hjá Fótbóltssambandinum, fótbóltsfeløgunum ella hjá Ítróttarsambandinum, sum mugu metast sum nakrir av grannunum og brúkarar av økinum í Gundadali.

Eisini er neyðugt, at avvarandi myndugleikar spyrja Gistingarhúsfelagið um teirra meining í sambandi við slíka bygging, — soleiðis at grundarlagi ikki verður tikið undan verandi hotelvirksemi.

Tað kemur mær fyri, at hjávinnan í samlaða virkseminum í Gundadali, við hesi verkætlanini køvir høvuðsvinnuna — nevniliga ítróttina í Gundadali — herímillum fótbóltin. — Tíverri má eg viðganga, at Tórsvallar ætlanin tikir mær alt meira ótýdlig.

Altjóða dystir á Tórsvølli

Samlaða talið á heimadystum hjá feløgunum í UEFA kappingunum fyri lið er umleið 4 um árið, og samlaða talið av heimadystum hjá landsliðunum er í miðal 3 um árið, tað vil siga, at leiktir verða í miðal 7 altjóða dystir í Føroyum um árið, og gevur hetta eina leiktíð uppá umleið 14 tímar.

Í løtuni er stórt trýst á UEFA og FIFA í sambandi við at fáa graslíki góðkent til altjóða dystir, og er hetta trýst ikki minst frá teimum stóru feløgunum í Evropa, sum hava trongar leikvallir, har ljósi illa sleppur at. Og hevur UEFA boða frá, at arbeitt verður fram ímóti at góðkenna graslíki til altjóða dystir frá kappingini 2004/05 at rokna.

Fótbóltssambandið hevur skipað fyri NM kappingum og EM undankappingum fyri U-landslið í Føroyum, á graslíki, og við góðum skoðsmálið frá luttakandi londunum og UEFA. Síðan tá, eru fleiri vallir skiftir út, við seinasta ættarliðið av graslíki og eru umstøðurnar tískil betraðar munandi.

Í sambandi við minstukrøvini frá UEFA til feløgini, leggur Fótbóltssambandið dent á, at fáa UEFA góðkenning soleiðis,

Framhald á síðu 12